# FRÁGREIĐING FRÁ NEVNDINI

# UM

# FELAGSINS VIRKSEMI Í UNDANFARNA ROKNSKAPARÁRI

**apríl 2024**

# Frágreiðing frá nevndini til eigararnar
# á aðalfundinum hin 19. apríl 2024

Árið 2023 var eins og undanfarna ár merkt av krígnum í Ukraina. Bæði uttanlands og her heima í Føroyum, m.a. við hækkaðum prísstøði sum avleiðing.

Meðan føroysku elbrúkararnir ikki merktu nakað til øktar elprísir í 2022, orsakað av krígnum, høvdu høgu vøru- og oljukostnaðirnir tó við sær, at neyðugt var at hækka elprísin 1. januar 2023. Harumframt álegði landið okkum tungoljuavgjald frá 1. januar 2024, sum hevði við sær, at neyðugt var at hækka elprísin við 5 oyrum pr. kWt uttan mvg fyri allar kundar felagsins.

Virksemið hjá Sev síðani seinasta ársaðalfund verður lýst nærri í hesi frágreiðing, har nevndin lýsir tey mál, sum nevndin metir hava størstan áhuga hjá eigarunum. Frágreiðingin verður latin sambært grein 3, stk. 12b og grein 4, stk. 11a í viðtøkum felagsins.

## Brúkarin

Grøna orkuskiftið hvílir í stóran mun á, hvussu føroysku heimini verða hitað og hvørjar flutningsmøguleikar fólk velja sær.

Ferð er komin á grøna orkuskiftið, og hetta setir m.a. krøv til løðimøguleikar. Infrakervið við almennum løðistøðum hjá Sev kring landið er eisini víðkað í 2023 við nýggjum almennum løðistøðum í Eysturoynni og Streymoynni.

Harumframt verður í løtuni royndarkoyrd nýggj skipan, nevnd Gestaløðing, serliga til vinnukundar, sum hava fyri neyðini at hava løðimøguleikar til starvsfólk og kundar, við smidligum gjaldsmøguleikum. Loysnin er eisini ætlað privatkundum, sum kunnu bjóða øðrum at løða heima hjá sær, uttan at skula hugsa um avrokning, tí hesum tekur skipanin sær av.

Talið á heimaløðistøðum veksur so hvørt sum fleiri fáa sær elbil. Arbeitt verður við nýggjari skipan – Heimaløðing – hvørs endamál er at lata elbilaeigarar løða meira burðardygt heima, við tað at Sev í ein ávísan mun stýrir løðingini í mun til tøku grønu orkuna.

Við grøna orkuskiftinum, nýggjum loysnum og tænastum, og harvið størri tørvi hjá kundum okkara at biðja um vegleiðing, vaksa krøvini til kundaavgreiðslu hjá Sev. Kundaøkið er tí styrkt, fyri betur at kunna veita góða kundatænastu, vegleiðing og ráðgeving. Hetta viðførir m.a. dagføring av ómaksgjøldum.

Í framhaldi av kundakanning gjørd í samstarvi við Lóður í 2019, varð í november gjørd uppfylgjandi kundakanning. Kanningin vísti eina greiða framgongd hvat umdøminum hjá Sev viðvíkur. Tølini vísa, at Sev í dag er høgt í metum hjá Føroya fólki.

## Grøna kósin

Enn einaferð kunnu vit staðfesta, at eftirspurningurin eftir elorku er vaksandi. Í 2023 sóu vit ein vøkstur á 5,1 prosent í mun til 2022. 230 Gigawatttímar vóru framleiddir úr burðardyggum orkukeldum í 2023, og tað eru 1,6 prosent fleiri enn í 2022.

Í 2023 var elframleiðslan tilsamans 58 samdøgur yvir 80 prosent burðardygg í meginøkinum, meðan framleiðslan í Suðuroy var yvir 80 prosent burðardygg í 156 samdøgur, og 100 prosent burðardygg í 129 samdøgur.

Úrtøkan úr vindorku er hækkað, meðan vatnorkuframleiðslan í 2023 minkaði í mun til árið fyri. Hetta kemst m.a. av, at nógv størri vindmáttur kom upp í 2022, og samstundis var 2023 eitt væl turrari ár.

2023 er eisini fyrsta heila árið, at vit hava havt stabiliserandi tøknina í Porkeri virkna, sum ger at væl meiri fæst burturúr vindorkuni í Suðuroy.

Líknandi skipan við battaríum og synkronkompensatori er verksett í meginøkinum og staðsett á Sundi, og tí fer eisini at bera til at fáa væl meiri vindorku til høldar í meginøkinum frameftir. Skipanin varð íverksett 8. desember 2023 á almennum hátíðarhaldi, har løgmaður Aksel V. Johannesen fekk heiðurin at seta skipanina í gongd.

Málið hjá Sev var at røkka 54 prosentum av burðardyggari elframleiðslu í 2023. Tað eydnaðist ikki at koma á mál við hesum, m.a. orsakað av, at skipanin við stabiliserandi tøkni í meginøkinum ikki kom í rakstur til væntaða tíð. Samlaða burðardygga elframleiðslan í 2023 var 50,3 prosent.

Fráboðaða ætlanin hjá Effo, nevnd Eysturlund, er spennandi og kann fara at hava ávirkan á varðagøtuna á grønu kósini við tað, at ídnaðarvirki fylla nógv í framskrivingini hjá Sev. Frágongd av størri framleiðsluvirkjum er ikki innroknað í ætlanirnar hjá Sev, men roknað er við einari øktari nýtslu innan framleiðslu o.l. Tað er ikki roknað við inntøkum frá eini umlegging hjá t.d. Havsbrún frá oljunýtslu til grøna elorku. Hetta er tað, sum Effo sigur seg fara undir í ætlan teirra. Men um so er, at Effo kemur at taka burturav partinum hjá Sev fyri verandi elnýtslu, við at fáa verandi elnýtarar inn á skipan teirra t.d. virkið hjá Bakkafrost á Glyvrum, so er søgan ein onnur.

Fyri at skunda undir grøna orkuskiftið, hevur Sev síðan 2019 havt í gildi eina stuðulsskipan, har vit hava latið brúkarum lægri prís fyri streym til elbil og/ella hitapumpu, tvs. ein rakstrarstuðul til grønan flutning og grøna hitaskipan. Treytirnar í lógarheimildini eru m.a., at henda streymnýtsla fer ígjøgnum serstakan málara. Gongd er síðani komin á orkuskiftið, og talið av sokallaðu grønu málarunum var pr. 26. mars 2024 komið upp á 3.641. Sev arbeiðir við at broyta skipanina, soleiðis at avsláttur kann latast uttan serstakan málara.

Somuleiðis hevur landið latið íløgustuðul við MVG-frítøku á elbilum og hitapumpum fyri at fáa gongd á orkuskiftið.

Við tað at landið nú hevur avgjørt at trappa niður almennu stuðulsskipanina við MVG-frítøku komandi árini at enda í 2028, er eisini viðgjørt at trappa niður stuðulsskipanina við lægri streymprísi til elbilar og hitapumpur. Hetta merkir, at stuðulin ætlandi minkar niður í helvt um 4 ár (í 2028) og fellur burtur um 6 ár (í 2030).

Somuleiðis er eisini ætlanin at avtaka stuðulin uppá tey 8 oyrini til ídnaðarkundarnar, frá avtaluni við landsstýrið frá 1992. Hetta verður ætlandi gjørt við 2 oyrum um árið frá 2025 at rokna og 4 ár fram.

## *Mýruverkið II - pumpuskipanin í Vestmanna*

Arbeitt hevur verið fram ímóti at kunna bjóða út arbeiðið uppá samlaðu verkætlanina. Útboðstilfarið er nú latið teimum, ið skulu geva tilboð. Tá ið øll størru tilboðini eru komin inn og viðgjørd, ber ætlandi til at koma við einari dagførdari og meira haldførari kostnaðarrammu, sum verður løgd fyri aðalfund til støðutakan hjá eigarunum. Hetta verður ætlandi í øðrum ella triðja ársfjórðingi í 2024. Hvat loyvum viðvíkur verður enn arbeitt við at fáa til vega byggiloyvi, avtalu við jarðareigaran og festaran og framleiðsluloyvi. Loyvi frá friðingarmyndugleikum og umhvørvisgóðkenning fyriliggja.

Kunnað hevur verið um verkætlanina á óformligum eigarafundum ávikavist hin 3. juli 2023, 30. oktober 2023 og 5. desember 2023 eins og kunnað varð á eykaaðalfundinum 8. desember 2023.

Fundur var hin 20. juli 2023 við Ingilín D. Strøm, landsstýriskvinnu um pumpuskipanina og serliga um ta fyritreyt, at tann nógvi vindmátturin, ið skal forsýna pumpuskipanina, má vera tøkur. Landsstýriskvinnan vísti til útbyggingarætlanina innan varandi orkuframleiðslu (smb. semjuskjalinum frá 22. mars 2022) og upplýsti hon eisini, at broytingar í elveitingarlógini fóru at geva "amboð", sum kunna tryggja eina smidliga útbyggingargongd. Landsstýriskvinnan fekk dagførda útbyggingarætlan handaða 26. oktober 2023.

Føroya Kærustovnur viðgerð í løtuni kæru frá Sp/f Vindrøkt, har kært er um, at Vindrøkt metir seg vera part í málinum hjá Umhvørvisstovuni, har Sev hin 4. apríl 2022 fekk tilsøgn um loyvi til pumpuverk millum verandi byrgingar hjá Sev í Heygadali og á Mýrunum.

## *Vindorka*

Stóru vindmyllulundirnar á Gellingarkletti og í Flatnahaga roynast væl. Samstarvið við hesar báðar partarnar verður regulerað við rakstrar- og prísavatalu, sum í løtuni fyriliggja í fyribils útgávu. Ætlanin er, at endaligu útgávurnar av avtalunum verða avgreiddar í fyrru helvt av 2024. Tað sama ger seg galdandi fyri P/F Vindfelagið í Neshaga og Porkeri viðvíkjandi vindmyllunum í Porkeri.

Nýggja battarístøðin á Sundi, ið skal stuðla upp undir ta nógvu óstøðugu vindframleiðsluna í meginøkinum, er tikin í brúk og roynist sum ætlað.

Tað er ein tung uppgáva, at fáa vindmyllurnar í Neshaga umvældar, soleiðis at hesar aftur kunnu framleiða. Samskiftið við Enercon hevur leingi gingið trekt, og neyðugt hevur verið at arbeiða við alternativum møguleikum, har aðrir veitarar kundu yvirtaka rakstur og viðlíkahald. Seinasta heyst kom tó vend í samskiftið, og avtala er gjørd við Enercon um útskifting av írestandi 4 generatorunum í 2024. Somuleiðis er mylla 4 í Neshaga, sum varð umvæld hjá Houghton International í Bretlandi, sett í rakstur við leiðbeining frá Enercon.

Arbeitt verður framhaldandi við at gera nýggjar rakstrar- og viðlíkahaldsavtalur fyri allar tríggjar vindmyllulundirnar hjá Sev, ta í Neshaga, í Húsahaga og í Porkerishaga.

Tá ið fyrra vindútboðið var á Gellingarkletti søkti Sev Búnaðarstovuna um at leiga lendi við Gellingarklett til vindorkuvirksemi. Búnaðarstovan avgjørdi 23. mai 2019 ikki at ganga umsóknini á møti. Sev kærdi avgerðina við áheitan um játtandi svar ella at málið varð víst aftur til nýggja viðgerð. Kærumyndugleikin (nú Uttanríkis- og vinnumálaráðið) hevur í skrivi til Sev dagfest 3. mai 2023 m.a. sagt, at *"Longu í 2005, tá tilsøgnin varð latin festaranum, var spurnartekin sett við, hvørt tilsøgnin var í samsvar við lóggávuna um útleigan av almennari jørð. Landið hevur kortini einki gjørt fyri at fáa greiðu á hesum viðurskiftum fyrr enn í 2018, tá ið Búnaðarstovan fór undir at taka tilsøgnina aftur. Avgerð Búnaðarstovuna um at taka tilsøgnina aftur varð kærd til Fiskimálaráðið, sum ógildaði*

*avgerðina við teirri grundgeving, at avgerðin um at taka aftur tilsøgnina ikki var nóg væl grundgivin. Málið var ikki víst aftur til Búnaðarstovuna til nýggja viðgerð, og avgerð Fiskimálaráðsins stendur tískil við. Fiskimálaráðið viðger ikki spurningin um, hvørt avtalan er lóglig, men – tá einki er viðmerkt um hetta – tykist Fiskimálaráðið hava ta fatan, at avtalan er lóglig.*

*Uttanríkis- og vinnumálaráðið metir tað vera ivasamt, um festari kann gera nevndu avtalu, eins og tað verður mett ivasamt, um Búnaðarstovan hevur heimild at góðkenna avtaluna. Kortini er tað so, at tá Fiskimálaráðið sum avvarðandi myndugleiki ikki kemur til aðra niðurstøðu, so má Uttanríkis- og vinnumálaráðið halda seg til, at avvarðandi myndugleiki hevur mett, at talan er um lógliga avtalu."*

Skrivið endar soleiðis: "*Uttanríkis- og vinnumálaráðið skal kortini leggja afturat, at uttan mun til, at Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevði mett SEV hava grein í sínum máli, so kann bara staðfestast, at hóast kæruviðgerðin hevði gingið SEV á møti í nærum øllum lutum, broytist støðan ikki, tí umrødda lendið er disponerað."*

Sev metir ikki, at tað tænir nøkrum endamáli at gera meira við hetta málið.

## *Annað á Grønu kósini*

Samstarv er gjørt við Danmarks Tekniske Universitet, NORA, Fróðskaparsetrið og Umhvørvisstovuna um granskingarætlan at gera vetni við elektrolysueindum og hvørji krøv hetta setur til eina avbyrgda elskipan.

Sambært pkt. 9 í semjuskjalinum frá 22. mars 2022 millum øðrumegin Umhvørvismálaráðið og hinumegin Kommunufelagið og Sev hevur Sev samstarvað við Umhvørvisstovuna um treytir fyri smáverk. Tvs. eina serskipan fyri kundar, sum ynskja at framleiða egnan streym til egna nýtslu og inn á netið hjá Sev við smærri framleiðslueindum t.e. upp til 200 kiloWatt. Semja er um treytirnar, sum eru tøkar á heimasíðuni hjá ávikavist Umhvørvisstovuni og Sev.

Sambært semjuskjalinum skal ein arbeiðsbólkur *"kanna hvussu ein marknaður í søluliðnum verður skipaður á ein einfaldan og ódýran hátt"*. Bólkurin kom við síni frágreiðing 1. desember 2023. Enn verður arbeitt við pkt. 10 í semjuskjalinum um hvussu framleiðslueindir hjá orkukrevjandi vinnufyritøkum kunnu verða knýttar í elkervið.

Í framhaldi av arbeiðnum við semjuskjalinum hava Kommunufelagið og Sev verið í samskifti við Umhvørvismálaráðið um uppskot til løgtingslóg um broyting í elveitingarlógini, sum í løtuni liggur til viðgerðar í tinginum.

Royndirnar hjá Minesto við sjóvarfalsdrekum í Vestmannasundi ganga nú á 5 ári. Teir tveir 100 kiloWatt drekarnir vísa góð úrslit, og royndarkoyringin av tí 1,2 MegaWatt stóru útgávuni er byrjað. Í hesum sambandi er prísavtalan millum Minesto og Sev endurnýggjað.

Minesto arbeiðir eisini við at fyrireika royndarverkætlan í Hestfirði við hesum nýggju 1,2 MegaWatt drekunum. Meira kunning er at finna á heimasíðuni www.minesto.se.

Skipað var fyri kunningarferð í Danmark í mai mánað, har nevndin og leiðslan kunnaðu seg um elketlar og landstreymsskipanir. Vitjað var á tveimum verkum hjá Ørsted, ið høvdu elketlar.

Somuleiðis var vitjað hjá Esbjerg havn og Skagen havn, har landstreymur var á skránni. Í Hadsund bleiv vitjað hjá PowerCon, ið framleiðir landstreymsskipanir.

Í mai var Sev vertur fyri væl eydnaðari altjóða ráðstevnu fyri smáar elskipanir, sum varð fyriskipað í samstarvi við týsku fyritøkuna Energynautics. Á leið 100 útlendskir granskarar, veitarar og umboð fyri elfyritøkur luttóku. Umhvørvisstovan og Effo stuðlaðu ráðstevnuni, sum vardi í 4 dagar.

Sev gjørdist í 2023 limur í óformliga netverkinum "Burðardygt Vinnulív", m.a. við tí endamáli at leggja enn størri dent á burðardyggan rakstur av felagnum. Netverkið steðgaði tó um ársskiftið 23/24.

Í desember vóru 70 ár liðin, síðan royndarkoyring byrjaði á Fossáverkinum í Vestmanna, og fólk í bygdum í Streymoynni, Eysturoynni og í Vágum fingu fyrstu kiloWatttímarnar frá Sev.

Arbeitt verður við skipan fyri sølu av el frá vindmyllum, ið annars ikki verður gagnnýtt – avlopsel - at selja til einstakar størri brúkarar, ið útvega sær elketil til fjarhita og/ella processhita ella størri hitapumpur til framleiðslu av heitum vatni og/ella dampi, ið verður brúkt til avloysing av nýtslu av olju í hitaveiting og/ella framleiðslu kundans.

Í hesum sambandi verður arbeitt saman við Fjarhitafelagnum um uppseting av einum 4.000 kubikkmetrar stórum heittvatnstanga á Sundi til goymslu av avlopshita frá Sundsverkinum og avlopsel frá vindmyllum umvegis elketilin, sum verður settur upp á Sundi í hesum árinum.

Arbeitt verður eisini við at gera avtalu við Vágs kommunu um hitaveiting til Páls høll.

Prísavtalur eru gjørdar við P/F Hiddenfjord um sólpanel á tekjum hjá teimum í Miðvági og á Fútakletti at knýta í elskipanina.

Sum verja av umhvørvinum er avgjørt at fara burtur frá at keypa anlegg til netið, ið virka við SF6 gassi.

Í februar 2024 vitjaði løgmaður við fylgi vindmyllulundina í Porkeri og koplingsstøðina í Heiðunum, har battarístøðin og synkronkompensatorin eru staðsett.

## Samskiftisleisturin dagførdur

Samskiftisleisturin hjá Sev, sum fevnir um búmerki, litir v.m. er dagførdur og eitt hóvligt skifti er í gongd. Nýggi leisturin byggir á íblástur úr litunum, sum Kampmann á sinni ráddi Sev til at brúka, og sum hava verið nýttir til bygningar felagsins síðani. Í 1999 fekk Sev nýtt búmerki, sum breyt frá uppruna leistinum, men nú verður so róð aftur á slóðina.

## Net- og aðrar útbyggingar

Árið 2023 líkist nógv undanfarnum árum við stórum útbyggingum á netinum. Hetta orsakað av vaksandi eftirspurningi frá bæði privatkundum og vinnukundum. Hjá privatkundum er tað serliga umleggingin frá olju til el, og nógvu stóru útstykkingarnar um landið, sum krevja útbyggingar, meðan hjá vinnukundunum eru tað útbyggingar og víðkanir.

Hjá pelagisku vinnuni eru tað víðkanir av verandi virksemi, meðan hjá alivinnuni eru tað serliga nýggju smoltstøðirnar, víðkanir av verandi virksemi og alingin á sjógvi, ið krevja alt meiri orku. Hetta, vænta vit, kemur at halda fram nøkur ár afturat.

Útbyggingar av framleiðslueindum hava kravt nakað av okkum seinnu árini, bæði viðvíkjandi íbindingarstøðum og stabiliserandi eindum. Her hevur verið neyðugt at bygt nýggj íbindingarstøð og stabiliserandi eindir. Fyrsta anleggið við stabiliserandi eindum í meginøkinum varð sett í rakstur beint fyri ársskiftið. Neyðugt er at halda fram við hesum útbyggingum fyri at fyrireika netið til at taka ímóti fleiri óstøðugum framleiðslueindum, sum ætlanin er at byggja í framtíðini. Eisini verður neyðugt at halda fram við at styrkja 0,4; 10; 20 og 60 kiloVolt netið.

Arbeiðið at leggja 20 kiloVolt kaðlar millum Tvøroyri og Vág er í gongd. Eftir ætlan verður hetta liðugt í 2024.

Arbeiðið at leggja 20 og 60 kiloVolt kaðlar millum Húsareyn og Sandoy er í gongd. Ætlandi verður hetta arbeiðið liðugt í mai mánað í ár.

Arbeiðið í Sandoyartunlinum er liðugt. Trafostøðin í Traðardali er somuleiðis liðug og støðin á Gomlurætt verður ætlandi liðug í summar.

Farið er undir at byggja ein nýggjan 8.000 m3 stóran oljutanga á Sundsverkinum. Hetta er neyðugt fyri at varðveita ætlaða veitingartrygdarstøðið. Seinastu árini hava vit bæði upplivað trot á olju orsakað av kríggi í Europa og góðskutrupulleikar í sambandi við størri umleggingar á altjóða marknaðinum (herd krøv til olju til skiparakstur frá IMO). Fundamentið til tangan er klárt í tangagarðinum á Sundsverkinum. Ætlandi er tangin klárur at taka í nýtslu í seinnu helvt av 2024, og fer kostnaðurin at liggja um 35 milliónir krónur.

Arbeiðið við nýggja elketlinum á Sundsverkinum er byrjað. Ketilin kemur væntandi til landið í summar og væntandi kemur hann í rakstur í heyst. Avtalað er gjørd við P/F Fjarhitafelagið um leigu av teirra parti.

Elveiting er eitt støðugt vaksandi virkisøki. Vøksturin er viðvirkandi til, at starvsfólkahópurin er støðugt vaksandi og hølistørvurin líka so. Arbeitt verður við at seta upp fleiri lonir á Landavegi 92, og hetta kemur væntandi at kosta 20,7 milliónir krónur, og verða tær tiknar í brúk í seinnu helvt av 2024.

Í 2021 fekk nevndin bræv frá Javnstøðunevndini, har gjørt bleiv vart við, at ásetingarnar í § 8 í Javnstøðulógini ikki verða hildnar. Hesin spurningur verður ætlandi viðgjørdur nærri, nú arbeiðast skal við bygnaðinum í Sev.

Umhvørvismálaráðið arbeiðir við dagføring av elveitingarlógini og hava Kommunufelagið og Sev, sum áður nevnt, samskift við Umhvørvismálaráðið um uppskot til løgtingslóg um broyting í elveitingarlógini, sum í løtuni liggur til viðgerðar í tinginum.

## Ársroknskaparúrslit 2023

Úrslitið hjá Sev í 2023 er 53,1 milliónir krónur eftir skatt og samsvarar hetta við fíggjarætlanina. Úrslitið er í ávísan mun ávirkað av virðisjavnan av teimum fíggjarligu amboðunum.

Nevnd og stjórn eru nøgd við úrslitið og fíggjarligu støðu felagsins við ársenda 2023.

Enn eru oljuútreiðslurnar ein sera stórur partur av rakstrarkostnaðinum. Ætlað varð, at kostnaðurin fór at liggja um 181 milliónir krónur, men gjørdist hesin 217 milliónir krónur. Hetta skyldast størri nýtslu av tungolju orsakað av minni íkasti frá grønu orkuverkunum vegna gott veður og seinking í veitingini av battarístøðini á Sundi.

Víst verður eisini til frágreiðingina ÁRSROKNSKAPUR 2023.

## Fíggjarætlanin 2024

Fíggjarætlanin 2024 er løgd til rættis við einari príshækking á 5 oyru pr. kiloWatttíma uttan MVG fyri allar kundar felagsins orsakað av hækkingini í avgjaldinum á tungoljunýtslu. Ætlaða úrslitið eftir skatt er 30,9 milliónir krónur, ið ikki er eitt nøktandi úrslit í mun til stóra virksemi, ið felagið er í holt við.

Ætlað er, at grønu orkuverkini veita 302 GigaWatttímar ella 64 prosent av samlaðu elframleiðsluni. Oljukostnaðurin er samsvarandi mettur til 219 milliónir krónur, av hesum eru 33 milliónir krónur avgjald til landskassan.

Víst verður eisini til frágreiðingina RAKSTRAR-, FÍGGJAR- OG ÍLØGUÆTLAN 2024.

## Tíðin fyri framman

"*Tit eru ein fyrimynd fyri okkum onnur. Eg eri bergtikin av, hvussu tit arbeiða, og eg ivist ikki í, at tit fara at náa tykkara máli*", segði forkvinnan í ES-nevndini Ursula von der Leyen, tá hon vitjaði Sev á Føroyaferð síni 14. mars í ár.

Eisini legði hon dent á, hvussu umráðandi tað er at gerast sjálvbjargin í orkuhøpi.

Og tað er júst tað, vit stremba fram ímóti hvønn dag. At gerast leys av oljuni og heldur at gagnnýta egnar orkukeldur og finna nýggjar loysnir á teimum avbjóðingum, sum hetta orkuskiftið hevur við sær.

Orkuskiftið krevur nógv av elframleiðsluni, og ikki minni av elnetinum. Stórar íløgur standa fyri framman fyri at tryggja, at Føroya fólk fær tryggan og støðugan streym, hóast parturin av óstøðugum orkukeldum økist. Fyrsta battarískipanin í meginøkinum er sum nevnt sett í rakstur, og ítøkiligar ætlanir eru um tvær afturat ávikavist í Skálafirði og í Sandoynni.

Kári Johansen, nevndarformaður
apríl 2024